# STØRV Á LANDSSJÚKRAHÚSINUM

## Leiðandi ljósmóðir (endurlýsing)

Nú landsstýrismaðurin í Almanna- og heilsumálum hevur avgjørt at seta í verk nýggja skipan av ljósmøðratænastuni í Føroyum, verður hervið søkt eftir leiðandi ljósmóðir.

Leiðandi ljósmóðir verður leiðari av ljósmøðratænastuni, ið umfatar ljósmøðravirksemi bæði á primera og sekundera økinum. Ljósmøðravirksemið í Føroyum er viðgonga, føðing og barsilstíð.

Leiðandi ljósmóðir verður sett á Landssjúkrahúsinum í nýggjari fyrisitingarligari eind við tilknýti til Skurðdepilin. Undir leiðandi ljósmóðir er á Landssjúkrahúsinum sett ein deildarljósmóðir.

Leiðandi ljósmóðir hevur evstu fakligu ábyrgd av ljósmøðravirkseminum í Føroyum, og vísa allar ljósmøður fakliga til hennara. Hon verður limur í nýggju føðiskipanarnevndini undir Almanna- og heilsumálaráðnum.

**Førleikakrøv**
- prógv og góðkenning sum ljósmóðir
- hollar starvsroyndir innan viðgongu, føðing og barsilstíð
- útbúgving innan leiðslu og /ella royndir innan leiðslu er ein fyrimunur
- teldukunnleiki

**Vit ynskja okkum eina leiðandi ljósmóðir, ið**
- fremur sunnan ljósmøðrahugburð
- er eldhugað, áræðin og framskygd
- hevur góð samstarvsevni
- hevur dirvi og hug at endurnýggja og menna ljósmøðratænastuna í Føroyum

**Nærri fæst at vita** við at ringja 304500 til Jytte Joensen, virk. leiðandi ljósmóðir, lokal 5301, LSjytjo@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 24. mai 2007 kl. 12.00

## Sjúkrarøktarfrøðingar til Bráðfeingisdeildina G1

Eitt fast starv sum sjúkrarøktarfrøðingur á brøki 0,8 er leyst at søkja til setan 1. juni 2007 ella eftir avtalu. Eisini verður søkt eftir sjúkrarøktarfrøðingum til farloyvisstørv, brøk eftir avtalu.

Deildin er ein heild við fleiri ymiskum funktiónum, og starvsettu koma eftir tørvi at hava ymiskar arbeiðsuppgávur, so sum røkt og viðgerð til sjúklingar á skaðastovu, í bráðfeingis móttøku, í dagskurð, í viðrakning og til intensivar sjúklingar. Deildin hevur 4 seingjarpláss í dagskurð, 5 í viðrakning og 5 til intensivar sjúklingar.

**Vit kunnu bjóða**
- innleiðslu og upplæring
- fjølbroytt arbeiðið og nógvar avbjóðingar

**Krøv til umsøkjararnar**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga í viðgerð og røkt av sjúklingum við bráðfeingis tørvi
- fleksibilitetur og góð samstarvsevni
- opin og positiv/ur
- vil søkja mennandi avbjóðingar
- má kunna arbeiða í skiftandi vaktum, dag-, kvøld- og náttarvaktum

**Fyrimun hava umsøkjarar, sum hava**
- fakligar royndir at viðgerða og røkta sjúklingar við bráfeingis tørvi
- minst 2 ára royndir á medisinskari og/ella kirurgiskari seingjardeild
- intensiva eftirútbúgving

**Nærri fæst at vita** um størvini við at ringja 304500 til Margit Stórá, deildarleiðara á G1, lokal 5811, mast@lsh.fo ella til Nainu Túgvustein, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102, naina@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 18. mai 2007 kl. 12.00

## Sjúkrarøktarfr. og heilsurøktarar/pleygarar til Psyk. D4/5

Tvey farloyvisstørv á starvsbrøki 0,7 og 0,8 í skiftandi vaktum eru leys at søkja til setan 1. juni 2007 til og við 31. mai 2009.

Deildin er ein psykiatrisk rehabiliterings-deild/bústovnur. Arbeitt verður eftir miljøterapeutiskum meginreglum, kontaktpersónsskipanini, og at menna brúkarar til økt sjálvbjargni.

**Krøv til umsøkjarar**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur, heilsurøktari ella pleygari
- góð samstarvsevni
- fakligan áhuga innan psykiatriska øki

**Vit kunnu bjóða**
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samarbeiði
- ávirkan á fakliga menning
- góða innleiðslu

**Nærri fæst at vita** um starvið við at ringja 304500 til Liss Jakobsen, deildarleiðara, lokal 4005, t-postur lija@lsh.fo ella Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 4102, t-postur bergitw@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 18. mai 2007 kl. 12.00

## Sjúkrarøktarfrøðingar til A2

Eitt fast starv sum sjúkrarøktarfrøðingur á starvsbrøki 0,7 í skiftandi vaktum er leyst at søkja til setan 1. juni 2007.
Eisini er eitt avloysarastarv á starvsbrøki 0,8 í skiftandi vaktum leyst at søkja til setan 1. juni til og við 31. desember 2007.

A2 er ein føði- og barsilsdeild við einari neonatalari eind. Deildin stendur fyri einari broyting, har tað verður ein kompliseraður partur undir leiðslu av sjúkrarøktarfrøðingi, og ein ókompliseraður partur, sum verður ljósmøðraleiddur.

**Førleikakrøv**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- góð samstarvsevni
- fleksibul og kreativ/ur
- hug til tvørfakligt samstarv

Fyrimun hava umsøkjarir við royndum innan neonatalogi

**Nærri fæst at vita** við at ringja 304500 til Miu Pedersen, deildarleiðara, lokal 5022 ella til Nainu Túgvustein, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 5102, naina@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 18. mai 2007 kl 12.00

## Onnur størv (sí meira á www.lsh.fo)

**Sjúkrarøktarfrøðingar til B8**
Umsóknarfreistin er 7. mai 2007 kl. 12.00

**Medicoteknikari**
Umsóknarfreistin er 7. mai 2007 kl.12.00

**Starvsfólk til Kaféina**
Umsóknarfreistin er 14. mai 2007 kl. 12.00

**Yvirlækni í onkologi á Med.**
Umsóknarfreistin er 21. mai 2007

**Yvirlækni í neurologi á Med.**
Umsóknarfreistin er 21. mai 2007

**Introduktiónstarv í intern med.**
Umsóknarfreistin er 15. juni 2007

## Ljósmóðir til Ljósmøðratænastuna

Eitt starv sum ljósmóðir á starvsbrøki 0,8 í skiftandi vaktum og tilkallivaktum er leyst at søkja til setan skjótast gjørligt til og við árið út.

**Førleikakrøv**
- prógv og góðkenning sum ljósmóðir
- sunnur ljósmøðrahugburður
- góð samskiftis- og samstarvsevni
- áhugi fyri mennandi avbjóðingum
- eldhugi, áræði og framskygni
- er ábyrgdarfull/ur og dugir at arbeiða sjálvstøðugt

**Nærri fæst at vita** við at ringja 304500 til Jytte Joensen, virk. leiðandi ljósmóðir, lokal 5301, LSjytjo@lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 24. mai 2007 kl. 12.00

Lønar- og setanartreytir samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið. Umsóknin skal vera Lønar- og starvsfólkadeildini í hendi, áðrenn freistin er úti.
Skrivlig umsókn við CV, autorisatión, prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið, Lønar- og starvsfólkadeildin, FO 100 Tórshavn**







## LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

Landssjúkrahúsið er meginsjúkrahús Føroya við umleið 20 serlæknaøkjum og 200 seingja-plássum. Tilsamans starvast yvir 800 fólk á Landssjúkrahúsinum, og endamál okkara er at bjóða føroyingum eina góða heilsutænastu á so nógvum økjum sum gjørligt.

Landssjúkrahúsið J.C. Svabosgøta 100 Tórshavn Tel: +298 30 45 00 Fax: +298 31 42 53 lsh@lsh.fo www.lsh.fo